Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	25. nov. 2025
Mál nr.:	23/19592-38
Málsviðgjørt:	TVR
Ummælistíð:	10.09.2025- 08.10.2025
Eftirkannað:	12. nov. 2025

Uppskot til

Løgtingslóg
um
miðlastuðul
(Miðlastuðulslógin)

Virkisøki løgtingslógarinnar

§ 1. Miðlastuðul til prentaðar tíðindamiðlar, loftbornar tíðindamiðlar við neyðugum loyvum og tíðindanetmiðlar kann sambært hesi løgtingslóg verða latin tíðindamiðlum sum rakstrarstuðul sambært §§ 3 og 4 og tíðindamiðlum sum íverksetarastuðul sambært §§ 5 og 6.

Avmarkingar

§ 2. Miðlastuðul sambært hesi løgtingslóg verður ikki latin tíðindamiðlum, sum heilt ella lutvíst eru ogn hjá almennum stovnum ella alment fíggjaðum feløgum o.tíl.
Stk. 2. Umframt avmarkingarnar sambært stk. 1 verður miðlastuðul ikki latin tíðindamiðlum, sum við helvtini ella meiri eru ogn hjá arbeiðsgevarafeløgum, arbeiðstakarafeløgum, vinnugreinafeløgum ella áhugafeløgum, undir hesum politiskum feløgum o.tíl.

Rakstrarstuðul

§ 3. 70% av árligu játtanini á fíggjarlógini til miðlastuðul verða latin teimum í § 1 nevndu tíðindamiðlum sum ein eins upphædd í prosentum av samlaðu, skjalprógvaðu útreiðslunum til beinleiðis journalistiska framleiðslu hjá viðkomandi tíðindamiðli árið fyri umsóknarárið, sbr. tó § 5, stk. 4, 2. pkt.

§ 4. Rakstrarstuðul verður, eftir umsókn til ta í § 7 nevndu Miðlastuðulsnevnd, latin teimum í § 1 nevndu tíðindamiðlum, treytað av, at tíðindamiðilin lýkur hesar treytir:

1) Tíðindamiðilin er ein sjálvstøðugur tíðindamiðil við einum ábyrgdarhavandi redaktøri,
2) tíðindamiðilin skal, íroknað tann ábyrgdarhavandi redaktørin, í minsta lagi hava eitt heilt lønt redaktionelt ársverk,
3) tíðindamiðilin skal í sínum redaksjonella tilfari venda sær til ein breiðan skara av brúkarum og ikki bert

til ávísar vinnubólkar ella yrkisbólkar, limir í yrkisfeløgum, politiskum flokkum, o.s.fr.,
4) tíðindamiðilin skal hava eitt redaksjonelt innihald innan eitt breitt evnisøki, og talan skal í høvuðsheitum vera um viðgerð av aktuellum tíðindatilfari av politiskum, samfelagsligum og mentanarligum slagi, sum er lagað til fólkið í Føroyum, og sum lýsir føroysk samfelagsviðurskifti ella útlendsk viðurskifti úr einum føroyskum sjónarhorni, og
5) um tíðindamiðilin er eitt vinnufelag, skal vinnufelagið vera skrásett í Føroyum, og um umsøkjari heftir persónliga fyri viðkomandi tíðindamiðli, skal umsøkjari hava fastan bústað í Føroyum ella áður hava búð í Føroyum í samanlagt 5 ár.

Stk. 2. Tíðindanetmiðil og loftborin tíðindamiðil skal, umframt tær í stk. 1, nr. 1-5 nevndu treytir, hava ein javnan og dagførdan tíðindastreym.

Íverksetarastuðul

§ 5. 30% av árligu játtanini á fíggjarlógini til miðlastuðul verða latin sum íverksetarastuðul til at seta ein nýggjan sjálvstøðugan tíðindamiðil á stovn, sum miðlar sjálvstøðugt journalistiskt viðgjørt tilfar, og:
1) í seinasta lagi 6 mánaðar eftir tilsøgn um stuðul til íverksetarastuðul er latin, hevur umsøkjarin ein ábyrgdarhavandi redaktør, sum, saman við redaksjonellum starvsfólkum, í minsta lagi hevur eitt heilt lønt ársverk, og
2) í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at tilsøgn um stuðul er latin, lýkur krøvini í § 4, stk. 1, nr. 3-5.

Stk. 2. Tilsøgn um íverksetarastuðul til at seta ein nýggjan sjálvstøðugan tíðindamiðil á stovn kann í mesta lagi verða veitt sum ein játtan yvir trý fylgjandi fíggjarár, og stuðulin verður útreiðslufördur í tí ári, sum stuðulin verður goldin út. Í tilsøgnini um játtan fyri 2. og 3. árið, eftir at tilsøgn er givin, verður fyrivarni tikið fyri møguligum broytingum í árligu játtanini, soleiðis at markið í stk. 1 áljóðandi 30% av árligu játtanini altíð verður hildið.

Stk. 3. Fyri at fáa íverksetarastuðul skal rímilig orsøk vera til at halda, at tíðindamiðilin, sum verður settur á stovn, kann bera seg fíggjarliga sjálvstøðugt, tá ið tilsagnartíðarskeiðið er úti.

Stk. 4. Tíðindamiðil, ið hevur fingið tilsøgn um íverksetarastuðul, kann ikki fáa rakstrarstuðul, so leingi tilsøgnin um íverksetarastuðul stendur við. Um tíðindamiðilin í tilsagnartíðarskeiðinum verður skipaður í eitt miðlasamtak, ið fær rakstrarstuðul sambært §§ 3 og 4, telja útreiðslurnar til journalistiska framleiðslu hjá viðkomandi tíðindamiðli, ið fær íverksetarastuðul, ikki uppí útrokningargrundarlagið til rakstrarstuðulin.

Stk. 5. Um Miðlastuðulsnevndin í undantaksføri, og eftir einari ítøkiligari meting av øllum umsóknum, ikki metir tað vera grundarlag fyri at brúka alla upphæddina til íverksetarastuðul, kann írestandi upphæddin tað ávísa tilsagnartíðarskeiðið latast sum ískoyti til árliga rakstrarstuðulin sambært § 3.

§ 6. Tað er ein treyt fyri at fáa íverksetarastuðul, at umsøkjarin hevur eginfígging, sum í minsta lagi svarar til 40% av metta tørvinum á stuðli sambært virksemisætlan og fíggjarætlan, ið verður latin inn í sambandi við umsóknina til Miðlastuðulsnevndina.

Miðlastuðulsnevndin

§ 7. Landsstýrisfólkið setir eina Miðlastuðulsnevnd við trimum limum at taka endaliga avgerð innan fyrisitingina um miðlastuðul. Avgerðir hjá Miðlastuðulsnevndini skulu fráboðast partinum skrivliga.

Stk. 2. Teir limir, ið verða tilnevndir sambært stk. 1, sbr. stk. 3, skulu samlað umboða førleikar, ið fevna um dyggan

kunnleika til og innlit í føroysk samfelagsviðurskifti, fjølmiðlar, fíggjarviðurskifti og roknskaparviðurskifti.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið tilnevnir tríggjar limir og tríggjar tiltakslimir í Miðlastuðulsnevndina eftir tilmæli frá teimum í nr. 1-3 nevndu feløgum:

1) Eitt umboð eftir tilmæli frá felagnum Føroysk Miðlafólk,
2) eitt umboð eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya, og
3) eitt umboð við løgfrøðiligum embætisprógvi eftir tilmæli frá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, sum er forfólk í nevndini.

Stk. 4. Við atliti at javnstøðu millum kynini skulu tilmælandi partarnir í stk. 3, nr. 1-3 skjóta upp bæði kvinnu og mann sum ávikavist lim og tiltakslim.
Stk. 5. Limir og tiltakslimir verða valdir fyri trý ár í senn og kunnu í mesta lagi sita í tvey skeið á rað.

§ 8. Umsøkjarar skulu nýta serligt oyðublað til umsóknir um miðlastuðul. Landsstýrisfólkið kunnar almenningin um umsóknarfreistir o.a. á síni heimasíðu.

§ 9. Miðlastuðulsnevndin er viðtøkuføri at veita miðlastuðul, tá ið allir limir eru møttir til fundar, tó kann forfólkið sjálvt avgreiða smærri mál.
Stk. 2. Forfólkið ger fundarskrá og kallar nevndina skrivliga inn til fundar til at viðgera innkomnu umsóknirnar.
Stk. 3. Við árslok á hvørjum ári gevur Miðlastuðulsnevndin landsstýrisfólkinum eina skrivliga frágreiðing um sítt virksemi. Landsstýrisfólkið leggur frágreiðingina alment fram á netið.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur fyri uppgávur, viðgerð og starvsskipan fyri virksemið hjá Miðlastuðulsnevndini.

Roknskapur og eftirlit

§ 10. Umsøkjari skal saman við stuðulsumsóknini til Miðlastuðulsnevndina lata inn grannskoðaðan roknskap samsvarandi kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Tíðindamiðilin skal harumframt saman við stuðulsumsóknini skjalprógva, at treytirnar fyri stuðli sambært løgtingslógini eru loknar.
Stk. 2. Umsøkjari skal upplýsa um øll viðurskifti av týdningi fyri metingina av stuðulsgrundarlagnum.
Stk. 3. Miðlastuðulsnevndin kann krevja stuðulsgrundarlagið nágreiniligari lýst og krevja innlit í skjøl hesum viðvíkjandi.
Stk. 4. Miðlastuðulsnevndin kann krevja stuðul heilt ella lutvíst rindaðan aftur, um tíðindamiðilin í sambandi við umsókn sína hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella í sama sambandi hevur tagt burtur týðandi upplýsingar, ella avgerandi fyritreytir fyri stuðlinum ikki longur eru til staðar, ella tíðindamiðilin ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars. Tað sama er galdandi, um tíðindamiðilin fer á húsagang o.tíl., sbr. eisini § 11, stk. 2.

Aðrar ásetingar

§ 11. Øll krøv eftir hesi løgtingslóg kunnu, saman við innkrevjingarkostnaði, verða innheintað við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum.
Stk. 2. Tað er bert umsøkjari sambært tilsøgn, ið hevur rætt til stuðul sambært hesi løgtingslóg, og tilsøgnin kann ikki verða avhend øðrum, sett í veð, tikin undir trotabúsviðgerð o.tíl.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um tey stuðulsumsitingarligu viðurskifti, ið eru nevnd í § 25, stk. 1, nr. 1-8 og nr. 10 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan.

Revsing

§ 12. Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við sekt, sum fremur brot á § 10, stk. 2 og 4 ella á reglur ásettar við heimild í § 11, stk. 3.
Stk. 2. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í kapittul 5 í revsilógini.

Gildiskoma og skiftisreglur

§ 13. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 35 frá 31. mars 2017 um miðlastuðul.
Stk. 2. Tilsagnir um miðlastuðul, ið eru latnar, áðrenn hendan løgtingslóg kemur í gildi, eru fevndar av áður galdandi reglum.
Stk. 3. Kunngerð nr. 139 frá 19. oktober 2017 um Miðlastuðulsnevnd hevur framvegis gildi men fer úr gildi við kunngerð, sum kemur í staðin fyri verandi kunngerð.
Stk. 4. Miðlastuðulsnevndin, ið er tilnevnd, áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, situr skeiðið.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í samgonguskjalinum stendur, at miðlalandslagið skal styrkjast, og at miðlastuðulsskipanin skal stuðla undir hesum. Miðlastuðulin hækkaði á fíggjarlógini fyri 2024 úr 2 mió. kr. og upp í 2,9 mió. kr. samanborið við undanfarnu árini, har miðlastuðulin hevur staðið í stað.

Samgongan ynskir við hesum, at privatum tíðindamiðlum verður lív lagað, og at verandi tíðindamiðlar skulu styrkjast við øktum rakstrarstuðli. Við uppskotinum hækkar rakstrarstuðulin við 40 prosentstigum, samstundis sum ætlanin er at hækka játtanina til miðlastuðul munandi. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 verður skotið upp, at játtanin til miðlastuðul gerst 4,9 mió. kr. Við uppskotinum verður miðlastuðul eisini latin til at seta ein nýggjan tíðindamiðil á stovn í senn umvegis íverksetarastuðulin. Verandi miðlar kunnu eisini søkja um at seta tíðindamiðilin á stovn.

Rakstrarstuðulin er lutfalsliga einfaldur at rokna út, sbr. serligu viðmerkingarnar til § 3. Um uppskotið verður samtykt, kann íverksetarastuðulin vera latin yvir trý fylgjandi fíggjarár, sum fer at lætta munandi um umsitingina av skipanini. Tó skal Miðlastuðulsnevndin hava leypandi eftirlit við teimum tíðindamiðlum, sum hava fingið stuðul til tess at kanna, hvørt hesir framhaldandi lúka treytirnar, og hava eftirlit við, um umstøðurnar fyri stuðlinum broytast.

Verður hugt at øðrum Norðurlondum, so vísir frágreiðing frá Nordicom frá 2022, ið er hjáløgd sum fylgiskjal 13, at í Danmark, Finnlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki verður veittur beinleiðis almennur stuðul til tíðindamiðlar.1 Endamálið við miðlastuðlinum er at fremja fjølbroytni í miðlaheiminum og at tryggja borgarunum atgongd til óheft og fjøltáttað tíðindatilfar.

Tær yvirskipaðu treytirnar eru, at stuðulsmóttakarar eru privatar tíðindamiðlar, og at tíðindamiðilin skal hava redaktiónsábyrgd, fjølbroytt og sjálvstøðugt tíðindatilfar og ein javnan tíðindastreym. Sambært frágreiðingini frá Nordicom fevnir stuðulin í vaksandi mun um bæði prentaðar og talgildar miðlar - og eisini ljóðmiðlar og myndmiðlar.

Danmark

- **Lógargrundarlag**: Lov om mediestøtte (2013).
- **Játtan**: Uml. 52 mió. evrur í 2021, ið mest verður latin sum redaktiónsstuðul.
- **Slag av stuðli:** Framleiðslustuðul, verkætlanarstuðul og hjálparstuðul til fíggjarliga sperdar miðlar.

Finnland

- **Lógargrundarlag**: Kunngerð frá 2008.
- **Játtan**: Uml. 0,5 mió. evrur um árið, ið bert er ætlað til miðlar á svenskum og minnilutamálum í Finnlandi.

Ísland

- **Lógargrundarlag**: Tíðaravmarkaðar kunngerðir frá 2020 og 2021.
- **Játtan**: Uml. 2,6 mió. evrur í 2021.
- **Slag av stuðli**: Rakstrarstuðul til tíðindaframleiðslu og stuðul til lokalar miðlar.

1 Nordicom er ein miðstøðu fyri norðurlendska miðlagransking knýtt at lærda háskúlanum í Gøteborg. Virksemið verður stuðlað av norðurlendska ráðharraráðnum.

- **Treytir**: Minst trý fulltíðarsett starvsfólk og ein javnan tíðindastreym.

Noreg

- **Lógargrundarlag**: Mediestøtteloven (2020).
- **Játtan**: Uml. 42 mió. evrur í 2021.
- **Slag av stuðli:** Framleiðslustuðul, nýskapanarstuðul, stuðul til samiskar miðlar og postútbering á útoyggj.

Svøríki

- **Lógargrundarlag**: Presstödsförordningen (1990) og Mediestödsförordningen (2018).
- **Játtan**: Uml. 102 mió. evrur í 2021.
- **Slag av stuðli:** Rakstrarstuðul, post- og útberingarstuðul, lokaljournalistikkur, redaktiónsstuðul og nýskapan.

Um roknað verður við íbúgvaratalinum og játtan til miðlastuðul, so liggja Føroyar í dag helst á støði við Ísland og Noreg pr. íbúgva, men nakað lægri enn Danmark og Svøríki, tó væl yvir Finnlandi. Sagt skal tó vera frá, at umstøðurnar í ávísu Norðurlondunum kunnu vera broyttar síðani frágreiðingina frá 2022, so fyrivarni verður tikið fyri hesum í samanberingini. Um stuðulin í Føroyum hækkar upp í 4,9 mió. kr., eru Føroyar helst tað Norðurlandið, ið gevur mest í miðlastuðli pr. íbúgva.

Í verandi støðu er føroyska miðlalandslagið veikt og viknandi, og tí er økt játtan til stuðulsskipanina ein fyritreyt fyri at røkka málunum, sum eru ásett í samgonguskjalinum. Veruleikin í Føroyum í dag vísir, at tað hevur týdning, at játtanin samlað hækkar, um miðlalandslagið skal styrkjast, sum tað stendur í samgonguskjalinum.

1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu verða 70% av játtanini sett av til verkætlanir av ymiskum slagi, og tey írestandi 30 prosentini verða sett av til lønir – uttan at hetta hugtak er nærri allýst, og er tí hugtakið í venju vorðið tulkað rættiliga breitt av Miðlastuðulsnevndini.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja verandi tíðindamiðlum rakstrarstuðul til beinleiðis journalistiska framleiðslu, eins og endamálið er at geva einum nýggjum sjálvstøðugum tíðindamiðli í senn møguleika at síggja dagsins ljós umvegis íverksetarastuðulin, har parturin av játtanini til íverksetarastuðul verður bundin upp yvir trý fíggjarár. Við øktu játtanini, hækkaðu prosentunum til rakstrarstuðul til journalistiska framleiðslu og møguleika at fáa tilsøgn um íverksetarastuðul til ein nýggjan miðil, verður tað mett, at uppskotið er við til at tryggja eitt sterkari og fjølbroyttari miðlalandslag. Verandi miðlar kunnu eisini søkja stuðul til at seta ein sjálvstøðugan tíðindamiðil á stovn.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Nýskipanin við uppskotinum er, at 30% av árligu játtanini verða sett av til at seta á stovn ein nýggjan tíðindamiðil, og rakstarstuðulin hækkar við 40 prosentstigum, men talan skal vera um útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu og ikki vanligan rakstur, s.s. olju, el,

tryggingar o.a. Slíkar útreiðslur verða ikki mettar sum útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu, hóast tær eru ein fyritreyt fyri einumhvørjum arbeiði. Eisini verður lógarásett, soleiðis at tað er greitt, at tilsagnir um stuðul ikki kunnu avhendast, um tíðindamiðil eitt nú fer á húsagang, eins og tilsagnir heldur ikki kunnu setast í veð sum trygd fyri lánum o.tíl.

Viðvíkjandi íverksetarastuðlinum er tað ein treyt, at talan er um ein sjálvstøðugan tíðindamiðil, og at umsøkjari, í seinasta lagi 6 mánaðar eftir at tilsøgn um stuðul til íverksetarastuðul er givin, hevur ein ábyrgdarhavandi redaktør, sum, saman við redaksjonellum starvsfólkum, í minsta lagi svarar til eitt heilt lønt ársverk. Starvsfólkið kann eisini vera fríyrkisfólk, tá ið treytin um lønt redaksjonelt ársverk skal gerast upp, sbr. serligu viðmerkingina til § 4 niðanfyri.

Tilsøgn um íverksetarastuðul kann bindast upp og útreiðsluførast yvir trý fylgjandi fíggjarár, sum hevur tann fyrimun, at tíðindamiðilin veit í nøkur ár, hvat hann kann vænta sær í miðlastuðli av árligu játtanini, tó so at fyrivarni má takast í tilsøgnini fyri møguligum broytingum í árligu játtanunum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið til løgtingslóg um miðlastuðul hevur verið til ummælis hjá hinum stjórnarráðunum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Dimmalætting, Eysturoyarportalinum, Felagnum Netmiðlar, Fróðskaparsetri Føroya, Starvsfelagnum, Kringvarpi Føroya, Føroyskum Miðlafólkum, Frihedsbrevet, Nordportal, Lindini, Miðlahúsinum, Norðlýsinum, Portalinum, Suðuroyarportalinum, R7, Rás2, Rás 1, TAKS, JN, Vinnuhúsinum og VP.

Tá ið ummælisfreistin var farin komu viðmerkingar inn frá Eysturoyarportalinum, TAKS, VP.fo, Frihedsbrevet, Føroyskum Miðlafólkum, JN.fo, Rás 2, Føroya Blaðútgevarafelag, FM1/Voxpop, Portal.fo, Miðlastuðulsnevndini og Vinnuhúsinum/Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Síðani uppskotið var til ummælis, er býtið millum rakstrarstuðul og íverksetarastuðul broytt út 60/40% og til 70/30%. Eisini er tað gjørt greitt, at verandi miðlar kunnu søkja um íverksetarastuðul.

Um tíðindamiðil, ið fær íverksetarastuðul, verður skipaður í eitt miðlasamtak í tilsagnartíðarskeiðinum, telja útreiðslurnar til journalistiska framleiðslu hjá viðkomandi tíðindamiðli, ikki uppí útrokningargrundarlagið til rakstrarstuðulin.

Eysturoyarportalurin mótmælir harðliga ætlanini um at seta ein nýggjan miðil á stovn við almennum pengum. Eysturoyarportalurin heldur uppskotið vera eitt beinleiðis álop á privatu miðlarnar og heitir tí á myndugleikarnar um at taka íverksetarastuðulin burtur og heldur tryggja, at KVF ikki tekur lýsingar inn.

Almanna- og mentamálaráðið heldur ikki, at tað er rætt at lýsa lógaruppskotið um miðlastuðul sum eitt álop á privatu miðlarnar. Endamálið er tvørturímóti at styrkja føroyska miðlalandslagið, bæði teir verandi miðlarnar og møguligar nýggjar miðlar til tess at tryggja fjølbroytni og ein óheftan tíðindaflutning í einum lítlum samfelagi.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 verður samlaða játtanin til miðlastuðul økt munandi, og 70% av játtanini til miðlastuðul verður beinleiðis markað til rakstrarstuðul til verandi miðlar, t.e. meiri enn tvífalt tað, sum miðlarnir í dag kunnu fáa í lønarstuðli. Harumframt kunnu verandi miðlar søkja um stuðul til at seta á stovn ein nýggjan sjálvstøðugan tíðindamiðil. Tó er tað bert ein, ið fær tilsøgnina til íverksetarastuðul.

Íverksetarastuðulin, sum fevnir um 30% av játtanini, er eitt tíðaravmarkað tiltak, ið kann stuðla einum nýggjum tíðindamiðli, um Miðlastuðulsnevndin metir tíðindamiðilin vera fíggjarliga burðardyggan. Uppskotið tekur tí ikki nakran stuðul frá verandi miðlum, men leggur nakað afturat tí, sum teir fáa í rakstrarstuðli.

Viðvíkjandi inntøkugrundarlagnum hjá Kringvarpinum, so hevur tað einki við hetta lógaruppskotið at gera, men vísast kann tó á, at ásett er í § 8, stk. 1 og 3 í kringvarpslógini, at loyvt er ikki Kringvarpi Føroya at hava lýsingarinntøkur á netmiðlum, sjónvarpsmiðlum ella útvarpsmiðlum Kringvarpsins, men Kringvarpið kann hava lýsingar á útvarpsmiðlum og sjónvarpsmiðlum sínum og kann krevja gjald í hesum sambandi. Gjaldið fer í landskassan, tó soleiðis at tað frá teimum inntøkum verða drignar beinleiðis rakstrarútreiðslur, ið Kringvarpið hevur í sambandi við at fáa nevndu inntøkur til vegar.

Vísast kann til broytingina í kringvarpslógini frá 2015, har tað stendur á bls. 6 í løgtingsmáli 26/2015:

"Av tí, at vit framvegis bert hava eina sjónvarpsrás, og hendan sostatt ikki kappast við privatar aktørar, verður framvegis loyvt Kringvarpinum at senda sjónvarpslýsingar. Hetta eisini fyri at varðveita og menna føroyska filmslýsingarvinnu, sum umboðar eina serstaka vinnu- og mentanargrein. Men fyri at varðveita fíggjarliga óheftnið fara inntøkurnar frá sjónvarpslýsingum framyvir í landskassan. Afturfyri verður ein serstakur miðlastuðul á fíggjarlógini."

Sostatt kunnu lýsingarinntøkur hjá Kringvarpinum, sum eftir broytingina í 2015 fóru í landskassan, sigast at vera við til at fíggja miðlastuðulin.

TAKS hevur eina tøkniliga viðmerking til § 11, stk. 1 í uppskotinum. TAKS mælir til, at ásetingin skal vísa til reglurnar um innkrevjing av skattum og avgjøldum heldur enn til sjálva skattalógina, tí skattalógin hevur ikki sjálvstøðugar reglur um panting.

Almanna- og mentamálaráðið tekur viðmerkingina til eftirtektar og hevur tí broytt § 11, stk. 1 samsvarandi.

Netavísin VP.fo heldur, at broytingarnar burtur frá verkætlanarstuðli til íverksetarastuðul eru enn eitt dømi um óstøðugar karmar, sum føroyska miðlavinnan hevur virkað undir seinastu árini.

Víst verður á, at føroyskir miðlar frammanundan eru smáir og spjaddir, og at stundum verður sagt, at miðlalandslagið er fragmenterað.

Um ætlanin er, at stuðulin so ella so skal kanaliserast ímóti eini konsolidering av verandi miðlum, t.e. eini tilgongd, har miðlarnir verða færri men størri, so kann uppskotið vera skilagott.

Almanna- og mentamálaráðið tekur undir við ynskinum um støðugar karmar fyri føroysku miðlarnar. Tí verður skotið upp, at hækka samlaðu játtanina til miðlastuðul á fíggjarlógini fyri 2026 við 2 mió. kr.. Um tað verður samtykt, og henda skipanin verður samtykt, fer samlaði miðlastuðulin til lønir úr 870.000 kr. og upp í 3.430.000 kr. í rakstrarstuðli til journalistiska framleiðslu.

Tað ber tí ikki til at siga, at íverksetarastuðulin tekur stuðul frá verandi miðlum, men ístaðin kann tað sigast, at hann kemur afturat, og hann er eitt fyribils stuðulstiltak til tess at fremja fjølbroytni og nýhugsan. Verandi miðlar kunnu eisini søkja um at seta ein nýggjan sjálvstøðugan tíðindamiðil á stovn. Rakstrarstuðul kann ikki verða veittur tí tíðindamiðli, ið hevur fingið tilsøgn um íverksetarastuðul, so leingi tilsøgnin um íverksetarastuðul stendur við, sbr. § 5, stk. 4 í uppskotinum. Men ein miðil ella miðlasamtak, ið fær rakstrarstuðul, kann hinvegin seta ein sjálvstøðugan tíðindamiðil á stovn, og nýggi tíðindamiðilin kann tá søkja um íverksetarastuðul. Tó telja útreiðslurnar til journalistiska framleiðslu hjá nýggja tíðindamiðlinum, ið hevur tilsøgn um íverksetarastuðul, ikki uppí útrokningargrundarlagið til rakstrarstuðulin.

Frihedsbrevet tekur ikki ímóti miðlastuðli og heldur seg tí ikki hava nakað ítøkiligt at viðmerkja. Takkar tó fyri møguleikan at svara.

Føroysk Miðlafólk fegnast um, at játtanin til miðlastuðul hækkar úr 2,9 til 4,9 mió. kr., og felagið heldur hetta vera eitt stig rætta vegin. Tó mælir felagið til, at íverksetarastuðulin ikki verður partur av hesi lógini, men at hann heldur verður settur í eina egnu lóggávu, um politiskt ynski er um at seta nýggjan miðil á stovn. Felagið tekur undir við, at rakstrarstuðulin verður markaður beinleiðis til journalistiska framleiðslu.

Almanna- og mentamálaráðið skal fyrst vísa á, at í Danmark er íverksetarastuðulin partur av donsku miðlastuðulslógini, tí bæði rakstrarstuðul og íverksetarastuðul hava sama endamál – at fremja fjølbroytni og at styrkja miðlalandslagið. Sama hugsjón liggur aftan fyri føroyska uppskotið, sum tó munandi víkir frá donsku lógini, ið hevur fleiri aðrar stuðulsmøguleikar t.d. stuðul til nýmenning og til miðlar, ið eru í fíggjarligum trupulleikum.

Hildið verður, at tað er skilabest, at allur miðlastuðul framhaldandi er savnaður í eini og og somu miðlastuðulslóg. At stovnseta ein tíðindamiðil sum eitt nú danska TV2 hevði kravt munandi broytingar í kringvarpslógini, sum hevði verið eitt mál fyri seg í mun til eitt nú public service-skyldur, gjald o.a.

JN.fo ynskir gomlu skipanina frá 2017 aftur, har 40% av játtanini vórðu latin sum ein eins grundupphædd til allar stuðulsumsøkjarar, og 60% av játtanini vórðu latin sum ein lutfalsligur stuðul. JN mælir frá treytini um eitt heilt lønt redaktionelt ársverk, sum kann gera tað ómøguligt hjá smærri miðlum at fáa stuðul. JN ynskir, at allur stuðul verður rakstrarstuðul, og at íverksetarastuðulin verður strikaður.

Almanna- og mentamálaráðið skal vísa á, at skipanin í uppskoti leggur dent á beinleiðis journalistiska framleiðslu heldur enn eina fasta grundupphædd, sum ikki er tongd at beinleiðis journalistiskum virksemi – einans lønum, sum í venju er vorðið tulkað breitt. Uppskotið verður mett at geva ein stuðul, sum í størri mun endurspeglar tað beinleiðis journalistiska virksemið hjá einum tíðindamiðli.

Viðvíkjandi ársverkum er hendan treyt longu galdandi í dag, og í almennu viðmerkingunum undir pkt. 2.3 omanfyri stendur lýst, hvat ítøkiliga verður meint við, tá ið talan er um ársverk.

Íverksetarastuðulin verður hildin at vera eitt týðandi amboð til at fremja nýskapan og fjølbroytni í miðlalandslagnum. Íverksetarastuðul tekur ikki nakað frá verandi miðlum. Tvørturímóti er tað ein møguleiki afturat tí økta stuðlinum, ið verandi miðlar kunnu fáa til

beinleiðis journalistiskar útreiðslur. Stuðulin til nevndu útreiðslur hækkar við 40 prosentstigum í mun til galdandi lóg. Samstundis gevur íverksetarastuðulin rúm fyri menning og fjølbroytni í føroyska miðlaheiminum.

Rás2 fegnast um, at lógaruppskotið fevnir um nýggjar miðlapallar, eitt nú poddvarp, og heldur, at tað er týdningarmikið, at lógaruppskotið leggur karmar, ið bæði tryggja fjølbroytni og javnræði millum almennar og privatar miðlar. Miðilin mælir tó til, at reglurnar um "javnan tíðindastreym" verða lagdar soleiðis til rættis, at tær eisini fevna um miðlar, sum geva út *on-demand*.

Rás 2 leggur dent á, at privatu miðlarnir skulu metast rímiliga í mun til Kringvarp Føroya, serliga tí teir hava stórar útreiðslur til tónleikarættindi, sum eisini stuðla føroyskari mentan. Treytin um "redaksjonell starvsfólk/ársverk" eigur ikki at merkja krav um ávísar útbúgvingar, men skal byggja á innihald og journalistiskt virksemi. Ítróttur eigur at teljast uppí "mentanarligt tilfar".

Rás 2 tekur undir við, at rakstrarstuðul verður høvuðsparturin av skipanini og mælir frá íverksetarastuðlinum, sum sambært Rás 2 kann geva nýggjum miðlum ósakligan fyrimun. Um hesin stuðulsmøguleiki verður veruleiki, eigur at verða hugsað um møguleika fyri, at nýggir miðlar frá seinastu árum eisini kunnu søkja um íverksetarastuðul.

Rás 2 saknar breiðari og fakligari samanseting av Miðlastuðulsnevndini, har tað eisini átti at verið tikið atlit at vinnuligum og fíggjarligum innliti.

Samanumtikið mælir Rás 2 til, at treytirnar verða rímiliga tulkaðar, at rakstrarstuðul verður høvuðsparturin, at íverksetarastuðulin annaðhvørt verður tikin úr lógini ella umskipaður, og at Miðlastuðulsnevndin verður breiðari umboðað og fakliga styrkt.

Almanna- og mentamálaráðið heldur, at treytin um "javnan og dagførdan tíðindastreym" eigur at kunna tulkast soleiðis, at eisini miðlar, ið geva út *on-demand*, kunnu fáa stuðul, um teir hava eina javna og dagførda framleiðslu av tíðindum.

Viðvíkjandi treytini um "redaksjonell starvsfólk/ársverk" verður staðfest, at treytin ikki merkir, at viðkomandi skal hava ávísa útbúgving – men treytin knýtir seg heldur at funktiónini. Orðingin er ikki nýggj, og hon hevur staðið síðani 2017, tá ið tann fyrsta miðlastuðulslógin kom í gildi. Tískil er eingin innihaldslig broyting hesum viðvíkjandi.

Almanna- og mentamálaráðið er samt við Rás 2 í, at ítróttur kann roknast sum mentanarligt tilfar.

Tað verður somuleiðis víst á, at stórur partur av játtanini – 70 % – verður latin sum rakstrarstuðul, og at íverksetarastuðulin er eitt tíðaravmarkað stuðulstiltak, sum ikki tekur stuðul frá verandi miðlum men er ein møguleiki afturat, so leingi tíðindamiðilin, ið fær íverksetarastuðul er sjálvstøðugur.

Almanna- og mentamálaráðið tekur ikki undir við, at tíðindamiðlar, sum longu eru stovnsettir, skulu kunna søkja íverksetarastuðul afturvirkandi, tá ið endamálið er at seta ein nýggjan tíðindamiðil á stovn. Verandi miðlar kunnu søkja rakstrarstuðul, sum er hækkaður í játtan og prosentstigum – eisini íroknað verkætlanarstuðulin.

Ein tíðindamiðil ella miðlasamtak, ið fær rakstrarstuðul, kann seta ein annan miðil á stovn, og nýggi tíðindamiðilin kann tá søkja um íverksetarastuðul. Um tíðindamiðilin í tilsagnartíðarskeiðinum verður skipaður í eitt miðlasamtak, ið fær rakstrarstuðul sambært §§ 3 og 4, telja útreiðslurnar til journalistiska framleiðslu hjá viðkomandi tíðindamiðli, ið fær íverksetarastuðul, ikki uppí útrokningargrundarlagið til rakstrarstuðulin.

Almanna- og mentamálaráðið tekur undir við ynskinum um breiða og fakliga samanseting av Miðlastuðulsnevndini, og ráðið metir, at verandi umboð longu tryggja eitt fakligt og óheft grundarlag, eins og játtan er á fíggjarlóg til at leita sær sakkøna hjálp, um tørvur skuldi verið á tí, sbr. eisini kunngerð um Miðlastuðulsnevnd, ið ásetur í § 6, stk. 2 og 3, at ein meiriluti av nevndini kann krevja sakkøna hjálp uttanífrá í sambandi við viðgerð av stuðulsumsókn.

Formaðurin fyrireikar málini, og formaðurin ræður yvir møguligum peningi til sakkønar metingar uttanífrá í sambandi við málsviðgerðina. Sakkønar metingar ella greiningar kunnu brúkast við tí endamáli at kanna, hvørt treytirnar í lógini fyri stuðli eru til staðar.

Føroya Blaðútgevarafelag er ímóti íverksetarastuðlinum og vil heldur brúka pengarnar til prentstuðul og útbreiðslustuðul, so at føroysk bløð á prenti kunnu halda áfram. Føroya Blaðútgevarafelag heldur eisini, at lógaruppskotið hevur við sær, at miðlar, sum hava gjørt verkætlanir, nú fáa munandi lægri miðlastuðul.

Eisini vil felagið vera við, at uppskotið kann vera í ósamsvari við kappingarlógina og biður um, at Kappingarráðið verður tikið við í hoyringina. Eisini vísir Føroya Blaðútgevarafelag á, at tað í viðmerkingum til lógaruppskotið stendur í »1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum« at »Nýskipanin við uppskotinum er, at 40% av árligu játtanini verður sett av til at seta á stovn nýggjan tíðindamiðil, og rakstarstuðulin hækkar við 30 prosentstigum, men talan skal vera um útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu og ikki vanligan rakstur, so sum olju, el, tryggingar o.a., sum ikki kann metast sum útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu, hóast tær eru ein fortreyt fyri einhvørjum arbeiði«.

Felagið heldur hetta vera beinleiðis misvísandi at skriva, tí við hesum kann skiljast, at miðlastuðul verður roknaður út frá útreiðslum til olju, el, tryggingar og annað. So er ikki.

Miðlastuðul verður bara roknaður út frá lønarútreiðslunum hjá miðlunum. Í galdandi lóg um miðlastuðul stendur um hetta: »Harumframt verða 30% av árligu játtanini á fíggjarlógini latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum *av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki«.*

Almanna- og mentamálaráðið skal vísa á, at endamálið við íverksetarastuðlinum er ikki at skapa ósakliga kapping - men at geva rúm fyri fjølbroytni og nýhugsan í einum lítlum miðlamarknaði. Íverksetarastuðulin er tíðaravmarkaður, og hann kann bert veitast einum miðli í senn og undir treytum um fíggjarliga burðardygd. Íverksetarastuðulin tekur ikki stuðul frá verandi miðlum, men hann kemur afturat stuðlinum til verandi miðlar, sum enntá verður hækkaður við 40 prosentstigum – og uttan treyt um nakra verkætlan – bert treyt um skjalprógvaðar útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu.

Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at stuðulin er í ósamsvari við kappingarlógina, tí talan er um eina almenna stuðulsskipan sambært lóggávu, og líknandi stuðulsskipanir eru eisini í øðrum Norðurlondum, t.d. í Danmark verður latið stuðul til *etablering og udvikling af*

nyhedsmedier, sbr. § 6 í donsku mediestøtteloven. Miðlastuðulslógin er harumframt bæði *lex posterior* og *lex specialis* í mun til kappingarlógina.

Almanna- og mentamálaráðið er ikki samt við Blaðútgevarafelagnum, tá ið sagt verður, at samandrátturin í pkt. 1.4 í lógaruppskotinum er misvísandi. Har stendur: ”Talan skal vera um útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu og ikki vanligan rakstur, s.s. olju, el, tryggingar o.a., sum ikki kann metast sum útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu, hóast tær eru ein fortreyt fyri einhvørjum arbeiði.”. Tað, sum stendur skrivað í pkt. 1.4, hevur bert til endamáls at gera greiðari, hvørjar útreiðslur kunnu stuðlast sum beinleiðis journalistisk framleiðsla í mun til vanligar rakstrarútreiðslur so sum hølisleiga, el og olja, um ivi skuldi verið um tað í umsitingini av lógini.

Viðvíkjandi ynskinum um serligan prentstuðul og útbreiðslustuðul, so er tað ein politiskur spurningur, hvat miðlastuðulin skal fara til. Ein váði við slíkari skipan er tó, at útreiðslurnar til útbreiðslu kunnu hækka samsvarandi.

FM1/Voxpop stuðlar endurskoðanini av lógini, men mælir frá íverksetarastuðlinum. Miðilin vil hava fokus á dygd og burðardygga menning heldur enn stuttvarandi verkætlanarstuðul. Í hoyringarskrivinum verður eisini ávarað ímóti almennari yvirredaktión, og hildið verður, at dentur eigur at verða lagdur á armslongdarprinsippið. FM1 heldur ikki, at tað er haldført at brúka almennan stuðul til at konstruera nýggjar miðlar, men at man heldur eigur at styrkja teir, sum longu hava prógvað sín týdning og sína samfelagsligu ábyrgd.

Mælt verður til, í staðin fyri íverksetarastuðul, at ein tøknimenningarstuðul verður settur á stovn.

Almanna- og mentamálaráðið er ikki samt við FM1/Voxpop um, at endamálið við íverksetarastuðlinum er at skapa “pop-up” miðlar, men hinvegin er endamálið at geva møguleika fyri fjølbroytni og nýhugsan undir skipaðum treytum og eftirliti.

Stuðulin er harumframt tíðaravmarkaður og kann hann bert veitast einum miðli í senn.

Íverksetarastuðul er grundaður á fakliga meting hjá óheftu Miðlastuðulsnevndini.

Við játtanini á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 fara verandi miðlar úr 870.000 kr. í lønarstuðli og upp í 3.430.000 kr. í rakstrarstuðuli til journalistiska framleiðslu – sum er meiri enn teir fáa í dag - íroknað verkætlanarstuðulin. Íverksetarastuðulin fer sostatt ikki at taka stuðul frá verandi miðlum, men hann kemur afturat.

Portal.fo tekur undir við, at miðlastuðulsskipanin verður endurskoðað, tí verandi skipan ikki hevur riggað væl. Miðilin er tó ímóti íverksetarastuðlinum.

Portal.fo vísir á, at tað er órímiligt, at ein nýggjur miðil kann fáa upp til tvær milliónir krónur um árið í fimm ár, meðan verandi miðlar stríðast fyri at halda raksturin uppi. Miðilin ivast í, at ein slíkur nýggjur miðil fer at kunna yvirliva, tá ið stuðulstíðin er úti, og heldur, at 40% av játtanini til íverksetarastuðul er alt ov nógv.

Portal.fo mælir til, at íverksetarastuðulin, um hann verður framdur í verki, einans skal mynda 10% av samlaðu játtanini, so nýggir miðlar gerast minni bundnir av almennari fígging og hava størri møguleika fyri at gerast sjálvbjargnir.

Miðilin metir annars, at miðlastuðulin, síðani hann varð settur í gildi, ikki hevur styrkt føroyska miðlalandslagið, men at orkan hjá privatu miðlunum tvørturímóti er minkað munandi.

Almanna- og mentamálaráðið skal vísa á, at endamálið við íverksetarastuðlinum er ikki at taka fíggjarliga grundarlagið undan verandi miðlum - men at menna fjølbroytni og nýhugsan í einum lítlum og avmarkaðum miðlamarknaði. Íverksetarastuðulin er tíðaravmarkaður og kann bert veitast einum tíðindamiðli í senn.

Íverksetarastuðulin verður eftir hoyringina 30% av játtanini á fíggjarlógini til miðlastuðul. Mett verður ikki, at íverksetarastuðulin fær ávirkan á rakstrarstuðulin, ið hækkar úr 30% av játtanini og upp í 70% av játtanini, sum enntá verður hækkað munandi í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

Í dag fáa verandi miðlar 30% av 2,9 mió. kr. í lønarstuðli, t.e. kr. 870.000. Um játtanin hevði verið óbroytt, høvdu verandi miðlar fingið kr. 2.030.000 í rakstrarstuðli. Í fíggjarlógaruppskotinum verður skotið upp at hækka játtanina upp í 4,9 mió. kr., sum við uppskotinum hevði givið verandi miðlum kr. 3.430.000 í rakstrarstuðli, sum er meiri enn øll játtanin til miðlastuðul í 2025 - íroknað verkætlanarstuðulin. Harumframt kunnu verandi miðlar søkja um íverksetarastuðul til at seta ein nýggjan sjálvstøðugan tíðindamiðil á stovn.

Miðlastuðulsnevndin tekur samanumtikið undir við lógaruppskotinum, og at verkætlanarstuðulin verður avtikin, tí nevndin metir ikki, at hann hevur tænt sínum endamáli.

Nevndin fegnast um, at verkætlanarstuðulin verður avtikin, men mælir frá at seta íverksetarastuðul í staðin. Hon heldur, at skipanin er ov tætt knýtt at donsku fyrimyndini og hóskar illa til føroysk viðurskifti. Nevndin mælir til, at allur stuðul verður brúktur til rakstrarstuðul grundað á lønarútreiðslur til journalistiskt arbeiði. Um íverksetarastuðulin verður settur í verk, eigur lutfallið (40%) at verða lækkað, tí stuðulin annars kann enda hjá miðlum, sum frammanundan hava fíggjarligan kapital.

Nevndin heldur, at nýggja orðingin í § 2, stk. 2 er linari enn verandi regla og kann geva møguleika fyri spekulatión, har fleiri miðlar hava felags eigarar, men kortini fáa stuðul hvør sær. Hon mælir til at varðveita verandi orðing ella gera hana greiðari, so tað er tryggjað, at stuðul bert verður latin óheftum miðlum.

Miðlastuðulsnevndin biður um at staðfesta, at stuðulin framvegis verður lutfalsliga roknaður eftir lønarútreiðslum til beinleiðis journalistiska framleiðslu. Tað eigur eisini at verða greitt, at skrivstovuhald og KT-útbygging ikki teljast við.

Harumframt mælir nevndin til at endurskapa 40%-loftið, sum hevur tryggjað, at størri miðlar ikki taka meginpartin av stuðlinum, og at smærri miðlar framvegis fáa ein rímiligan lut.

Almanna- og mentamálaráðið skal vísa á, at endamálið við íverksetarastuðlinum er at styrkja nýhugsan og menning í einum lítlum miðlalandslagi - og ikki at taka stuðul frá verandi miðlum. Stuðulin til verandi miðlar verður hinvegin hækkaður munandi bæði í

prosentstigum og í játtan á fíggjarlógini.

Viðvíkjandi § 2, stk. 2 so er her helst talan um eina misskiljing. Ásetingin forðar fyri, at miðlastuðul verður latin tíðindamiðlum, sum við helvtini ella meiri eru ogn hjá arbeiðsgevarafeløgum, arbeiðstakarafeløgum, vinnugreinafeløgum ella áhugafeløgum, undir hesum politiskum feløgum o.líkn. Hetta skal tískil ikki skiljast sum ein avmarking hjá miðlum at seta á stovn ein annan sjálvstøðugan miðil. Tann nýggi miðilin kann søkja um at fáa íverksetarastuðul, men hann kann ikki í tilsagnartíðarskeiðinum eisini fáa rakstrarstuðul, sbr. § 5, stk. 4. Um tíðindamiðilin í tilsagnartíðarskeiðinum verður skipaður í eitt miðlasamtak, ið fær rakstrarstuðul sambært §§ 3 og 4, telja útreiðslurnar til journalistiska framleiðslu hjá viðkomandi tíðindamiðli, ið fær íverksetarastuðul, ikki uppí útrokningargrundarlagið til rakstrarstuðulin.

Annaðhvørt eru samlaðu journalistisku útreiðslurnar hjá miðlasamtakinum grundarlagið undir stuðulsveitingini, ella eru tað journalistisku útreiðslurnar hjá einstaka miðlinum, ið eru grundarlagið undir stuðulsveitingini. Stuðulsprosentið er tað sama, so tískil er tað sama prosent í mun til eina stóra upphædd ella í mun til eina minni upphædd, ið verður veitt í miðlastuðli. Frymilin er nærri lýstur á bls. 18 og 19 í lógaruppskotinum.

Viðvíkjandi beinleiðis journalistiskum útreiðslum verður stuðulin framvegis roknaður lutfalsliga eftir útreiðslum til beinleiðis journalistiska framleiðslu, og í viðmerkingunum til § 3 verður greitt frá, at meiri óbeinleiðis útreiðslur ikki telja við. Óbeinleiðis útreiðslur kundu eitt nú verið útreiðslur til KT-forritan, fyrisiting, skrivstovuhald o.líkn.

Vinnuhúsið / Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir frá at gera eina skipan við íverksetarastuðli, tí ein slík skipan, har landið stuðlar nýggjum miðlum, kann skeikla kappingina og seta verandi privatar miðlar, sum frammanundan hava truplar treytir, í eina verri støðu. Hetta verður mett at vera í ósamsvari við endamálið um at styrkja føroyska miðlalandslagið. Vinnuhúsið mælir tí til, at §§ 5–6 um íverksetarastuðul verða strikaðar, og at nýggir miðlar skulu klára seg undir somu fortreytum sum verandi.

Felagið vísir eisini á, at hóast ein tøknineutral stuðulsskipan kann tykjast rímilig, eru útreiðslurnar hjá prentaðum miðlum munandi hægri enn hjá talgildum.

Afturat hesum mælir Vinnuhúsið til, at Kappingarráðið fær høvi at viðgera uppskotið fyri at tryggja, at tað er kappingarført og javnt fyri allar miðlar.

Almanna- og mentamálaráðið skal vísa á, at endamálið við íverksetarastuðlinum er ikki at skeikla kappingina á marknaðinum - men at menna fjølbroytni og nýhugsan í einum lítlum og avmarkaðum miðlalandslagi. Stuðulin er tíðaravmarkaður, og hann kann bert veitast einum miðli í senn, og hann verður veittur undir treytum eftir óheftari meting hjá Miðlastuðulsnevndini.

Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at stuðulin er í ósamsvari við kappingarlógina, tí talan er um eina almenna stuðulsskipan sambært lóggávu, og líknandi stuðulsskipanir eru eisini í øðrum Norðurlondum, t.d. í Danmark verður latin stuðul til *etablering og udvikling af nyhedsmedier*, sbr. § 6 í donsku mediestøtteloven. Miðlastuðulslógin kann sigast at vera bæði *lex posterior* og *lex specialis* í mun til kappingarlógina.

Almanna- og mentamálaráðið er samt við Vinnuhúsinum í, at prentaðir miðlar hava hægri framleiðslukostnað, men ráðið heldur, at ein tøknineutral skipan tryggjar størri rættvísi millum miðlar, ið virka við ymiskum miðlapallum. Hetta gevur eisini rúm fyri menning av bæði prentaðum og talgildum miðlum í einum samfelag, har tøkniliga menningin broytist skjótt.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Miðlastuðulin verður fíggjaður av landsins fíggjarlóg. 70% av árligu stuðulsjáttanini fara til rakstrarútreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu, og ikki til meiri vanligar útreiðslur s.s. leigu, el, hita o.líkn. 30% av játtanini fara til íverksetan til tess at seta ein nýggjan tíðindamiðil á stovn. Tilsøgn um íverksetarastuðul kann bindast upp í trý fylgjandi fíggjarár soleiðis at skilja, at stuðulin til íverksetan gerst oyramerktur til ávísan umsøkjara, tó við fyrivarni fyri broytingum í árligu játtanini á fíggjarlógini.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Miðlastuðulsnevndina, ið skal viðgera umsóknir um stuðul og føra eftirlit við teimum umsøkjarum, ið hava fingið tilsøgn um stuðul. Mett verður, at tað verður ein umsitingarligur lætti fyri nevndina, tá ið 30% av árliga stuðlinum eru bundin upp yvir nøkur fíggjarár, soleiðis at tað ikki verður neyðugt at lýsa eftir umsóknum á hvørjum ári til íverksetarastuðul. Tó verður framvegis neyðugt at lata rakstrarstuðul til beinleiðis journalistiska framleiðslu eftir umsókn á hvørjum ári, sum tó kann sigast at vera einfaldari umsitingarliga, har frymilin er: (70% av játtanini á fíggjarlógini/samlaðu rakstrarútreiðslunum til beinleiðis journalistiska framleiðslu hjá øllum skikkaðum umsøkjarum) x 100 = x% í rakstrarstuðli til allar miðlarnar, sbr. nærri í serligu viðmerkingini til § 3.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur avleiðingar fyri miðlavinnuna, ið fær stuðul til útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu, t.e. er ikki vanligar rakstarútreiðslur so sum leigu, el, hita.

Eisini verður møguleiki fyri at søkja um stuðul til íverksetan til tess at seta ein nýggjan tíðindamiðil á stovn, ið kann kappast við teir verandi tíðindamiðlar. Av tí, at játtanin ikki er so stór, verður tað ov smábýtt, um fleiri tíðindamiðlar skulu býtast um tey 30 prosentini av játtanini.

Verður hugt at lønartalvuni hjá Starvsfelagnum frá 1. apríl 2025, so fær eitt fjølmiðlafólk, ið er fevnt av bachelor-stiganum, kr. 40.004,03 í byrjanarløn um mánaðan, íroknað eftirløn áljóðandi 15%, t.e. ein árlig løn áljóðandi kr. 480.048,36. Eftir átta árum fær viðkomandi endaløn áljóðandi kr. 45.933,70 í løn um mánaðan, íroknað eftirløn, t.e. ein árlig løn áljóðandi kr. 551.204,40. Tá eru møguligar viðbøtur o.a. ikki tiknar við.

Um hugsað verður, at árliga játtanin til miðlastuðul gerst 4,9 mió. kr., harav 1,47 mió. kr. um árið fara til ein tíðindamiðil sum íverksetarastuðul, svarar tað til áleið trý journalistisk ársverk.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki umhvørvisligar avleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, tí miðlastuðul verður mettur at fella uttan fyri innihaldsvíddina sambært grein 3 í Hoyvíkssáttmálanum.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Miðlastuðul má metast at hava jaligar fylgjur í mun til grundleggjandi politiska rættin í grein 10 (1) í EMRS, ið verjir og tryggjar skrivi-, talu- og framsøgufrælsið í einum fólkaræðisligum landi, undir hesum rættinum hjá tí einstaka at taka ímóti kunning frá privatum miðlum. Tó er tað neyvan ein positiv skylda sambært EMRS at stuðla privatum miðlum, hóast fleiri lond hava tílíkar skipanir, eitt nú Danmark, Ísland, Noreg, Svøríki, Finnland og Grønland.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar markaforðingar, men tað er ein treyt fyri miðlastuðli, at vinnufelagið handan miðilin er skrásett í Føroyum, og at umsøkjari skal hava fastan bústað í Føroyum ella áður hava búð í Føroyum í samanlagt 5 ár. Í dómi frá Eystara landsrætti, U.1983.986Ø, vísir danska Forsætismálaráðið, at tað hevur tulkað § 10, stk. 2, 2. pkt. í heimastýrislógini soleiðis, at tað verður góðtikið, at eitt nú atgongdin til at reka ávísa vinnu er treytað av donskum ríkisborgararætti og bústaði í Føroyum. Sjónarmiðið er grundað á, at tað stendur einhvørjum donskum ríkisborgara frítt at búgva í Føroyum ella at hava fastan bústað í Føroyum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ásetingar um revsing við sekt fyri tann, ið fremur brot á § 10, stk. 2 og 4 ella á reglur ásettar við heimild í § 11, stk. 3. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í kapittul 5 í revsilógini.

Eisini hevur lógaruppskotið ásetingar um pantiheimildir við tað, at øll krøv eftir løgtingslógini kunnu, saman við innkrevjingarkostnaði, verða innheintað við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum. Hetta eru reglur, sum í stóran mun longu eru galdandi í dag, og sum ikki eru óvanligar, tá ið talan er um almenn stuðulsmál. Tí verður inntrivið mett rímiligt og neyðugt.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld annað enn, at øll krøv eftir løgtingslógini kunnu, saman við innkrevjingarkostnaði, verða innheintað við panting.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Áseting er í § 10 um roknskap og eftirlit við teimum, ið hava fingið tilsøgn um miðlastuðul.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Eins og í dag kann landsstýrisfólkið áseta nærri reglur fyri uppgávur, viðgerð og starvsskipan fyri virksemið hjá Miðlastuðulsnevndini. Landsstýrisfólkið tilnevnir eisini limirnar í Miðlastuðulsnevndini eftir tilmæli frá ávikavist Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Føroyskum Miðlafólkum og Fróðskaparsetri Føroya. Harumframt fær landsstýrisfólkið, eins og í dag, heimild til at áseta nærri reglur um tey stuðulsumsitingarligu viðurskifti, ið eru nevnd í § 25, stk. 1, nr. 1-8 og nr. 10 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Sosialar avleiðingar	[redacted]	Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Bløð, dagbløð og tíðindabløð eru at meta sum prentaðir tíðindamiðlar í lógarinnar høpi.

Við "loftbornar tíðindamiðlar" skilst vanligt útvarp og sjónvarp. Tó er sett sum treyt, at hesi skulu hava fingið neyðug loyvi til vegar. Serliga verður hugsað um frekvensloyvi, konsessjónsloyvi og møguligt sendiloyvi sambært kringvarpslógini, tá ið talan er um aðrar kringvarpsstøðir. Hugtakið "aðrar kringvarpsstøðir" fevnir sambært kringvarpslógini um kringvarping av sendingum um fjarskiftiskervið, soleiðis sum hetta er allýst í fjarskiftislógini.

Hugtakið "tíðindanetmiðlar" fevnir um miðlar, hvørs tíðindainnihald verður flutt umvegis skipanir knýttar at teldlum og snildfonum. Hugtakið "tíðindanetmiðlar" hevur til endamáls at vera óheft av ávísari tøkni, og sostatt fevnir hugtakið eisini um framtíðar miðlapallar, ið eru grundaðir á brúk av alnetinum. Sostatt kunnu miðlar, ið eitt nú eru grundaðir á poddvarp o.a.m., koma undir lógina.

Til § 2
Ásetingin er negativt orðað og vísir tískil, at lógin fevnir bert um privatar tíðindamiðlar. Í hesum sambandi kann tað almenna hvørki heilt ella lutvíst, beinleiðis ella óbeinleiðis eitt nú gjøgnum almenn partafeløg o.tíl. hava nakran lut í ognarskapinum hjá viðkomandi tíðindamiðli, men til ber kortini at fáa almennan stuðul frá Vinnuframa o.líkn. almennum stovnum/grunnum.

Í stk. 2 er ásett, at miðlastuðul ikki verður latin tíðindamiðlum, sum við helvtini ella meiri eru ogn hjá arbeiðsgevarafeløgum, arbeiðstakarafeløgum, vinnugreinafeløgum ella áhugafeløgum, undir hesum politiskum feløgum. Her verður bæði hugsað um vanlig yrkisfeløg, samtøk, politisk feløg o.líkn.

Til § 3
Rakstrarútreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu fevna eitt nú um útreiðslur til lønir til redaksjonell starvsfólk og útreiðslur til fríyrkisfólk, ið starvast við redaksjonellum tilfari á einum tíðindamiðli, eitt nú skrivandi tíðindafólk, redigerandi tíðindafólk, fotografar, kannandi journalistar, blaðteknarar o.o., sum arbeiða við redaksjonellum tilfari hjá viðkomandi umsøkjara.

Fyri at tryggja, at allir umsøkjarar, ið lúka treytirnar, fáa eina eins upphædd í prosentum av skjalprógvaðu rakstrarútreiðslunum til beinleiðis journalistiska framleiðslu árið fyri umsóknarárið, verður árliga stuðulsprosentið funnið við at býta samlaðu játtanina á figgjarlógini til endamálið við rakstrarútreiðslurnar hjá øllum umsøkjarum tilsamans, ið lúka treytirnar, og falda tað útslitið við 100:

(Játtan til rakstur býtt við samlaðu rakstrarútreiðslurnar til beinleiðis journalistiska framleiðslu hjá øllum umsøkjarunum) * 100 = x% til allar umsøkjarar, ið lúka treytirnar.

Dømi: Árliga játtanin til miðlastuðul er kr. 2,9 mió. 70% av játtanini er oyramerkt til rakstrarstuðul til beinleiðis journalistiska framleiðslu = kr. 2.030.000,00:

Játtan til rakstrarstuðul (A): Kr. 2.030.000		**Stuðulsprosent (D) = (A/B)*100 = 23,47**
Umsøkjarar	**Rakstrarútreiðslur (C)**	**Rakstrarstuðul (C/100)*D**
Miðil 1	3500000	821387,2832
Miðil 2	2000000	469364,1618
Miðil 3	1500000	352023,1214
Miðil 4	700000	164277,4566
Miðil 5	950000	222947,9769
Samlað (B)	**8.650.000**	**2.030.000**

Um játtanin til miðlastuðul hækkar til 4,9 mió. kr., hevði roknistykkið og rakstrarstuðulin sæð soleiðis út:

Játtan til rakstrarstuðul (A): Kr. 3.430.000		**Stuðulsprosent (D) = (A/B)*100 = 40,46**
Umsøkjarar	**Rakstrarútreiðslur (C)**	**Rakstrarstuðul (C/100)*D**
Miðil 1	3500000	1387861,272
Miðil 2	2000000	793063,5838
Miðil 3	1500000	594797,6879
Miðil 4	700000	277572,2543
Miðil 5	950000	376705,2023
Samlað (B)	**8.650.000**	**3.430.000**

Um talan hinvegin er um eitt miðlasamtak, verða tað reglurnar í vinnufelagslóggávuni, skattalóggávuni, ársroknskaparlóggávuni o.tíl., sum eru avgerandi fyri, hvørt talan er um eitt samtak, og tað hevur umsøkjari skyldu til at upplýsa fyri Miðlastuðulsnevndini í sambandi við umsóknina. Vanliga hevur eitt móðurfelag ræði á sínum dótturfeløgum við eitt nú at hava meiri enn 50% av atkvøðurættinum í dótturfelagnum, rætt til at velja fleirtalið í nevndini. Tað verður vanliga gjørdur ein roknskapur fyri alt miðlasamtakið, uttan so at viðkomandi myndugleiki hevur givið undantak fyri smærri samtøkum. Umsøkjarin má grundgeva fyri, hvørt talan er um eitt miðlasamtak.

Til § 4

Tað verður framhaldandi Miðlastuðulsnevndin, ið tekur endaligar avgerðir innan fyrisitingina um miðlastuðul, eins og tað hevur verið øll árini, síðan skipanin við miðlastuðli bleiv sett í gildi í 2017. Formliga skulu umsøkjarar søkja við at nýta serligt oyðublað til endamálið, sbr. § 8, 1. pkt., ið sum áður verður at heinta á heimasíðuni hjá landsstýrisfólkinum.

Greinin viðvíkur kumulativum treytum fyri miðlastuðli. Treytirnar í nr. 1, 2 og 5 eru

objektivar reglur, meðan treytirnar í nr. 3 og 4 eru subjektivar metingar (standardar), ið Miðlastuðulsnevndin má gera sær, sbr. í hesum sambandi formligu krøvini til innihaldið í einari grundgeving í § 23, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Harumframt kann nevnast, at ein meting altíð skal vera grundað á saklig og viðkomandi atlit í mun til ta lóggávu, ið myndugleikin umsitur.

Ásetingin í nr. 1 um ein ábyrgdarhavandi redaktør er ein ábending um, hvussu sjálvstøðugur miðilin er. Tann ábyrgdarhavandi redaktørurin er ábyrgdarsubjekt sambært reglunum í fjølmiðlaábyrgdarlógini.

Treytin í nr. 2 um redaksjonelt ársverk merkir, at talan í minsta lagi skal vera um eitt heilt lønt redaksjonelt ársverk íroknað tann ábyrgdarhavandi redaktørin. Tað kunnu eisini vera tvey ella fleiri parttíðarsett redaksjonell starvsfólk, so leingi treytin um í minsta lagi tilsamans eitt heilt lønt redaksjonelt ársverk er lokin. Redaksjonell starvsfólk eru tíðindafólk, ið skriva tíðindi og/ella ritstjórna tíðindum, myndafólk, blaðteknarar, grafikarar, fólk, ið gera kanningararbeiði fyri miðilin (researchers), o.fl., ið arbeiða við redaksjonella tilfarinum hjá miðlinum.

Í nr. 3 er sett sum treyt, at tíðindamiðilin skal venda sær til ein breiðan skara, t.e. tíðindamiðilin skal viðgera evni av breiðum samfelagsligum áhuga. Til dømis kann tíðindamiðilin viðgera føroysku fiskivinnuna sum part av samfelagnum, men um tíðindamiðilin t.d. í høvuðsheitum bert viðger skipabygging ella skipatøkni generelt, er hetta neyvan dømi um nakað, ið vendir sær til ein so mikið breiðan skara, at talan er um breiðan samfelagsligan áhuga. Tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi ávísum vinnubólkum, yrkisbólkum, politiskum flokkum o.s.fr.

Miðlastuðulsnevndin skal í síni málsviðgerð gera eina ítøkiliga meting av hesum viðurskiftum, og tíðindamiðilin kann í umsóknini greiða nærri frá, hvussu tíðindamiðilin sjálvur metir hesar treytir vera loknar.

Í nr. 4 er sett sum treyt, at tíðindamiðilin skal hava eitt breitt evnisøki, og at talan skal í høvuðsheitum vera um viðgerð av aktuellum tíðindatilfari av politiskum, samfelagsligum og mentanarligum slagi, sum er lagað til fólkið í Føroyum, og sum lýsir føroysk samfelagsviðurskifti ella útlendsk viðurskifti úr einum føroyskum sjónarhorni. Hetta merkir eitt nú, at lýsingar, tíðindaskriv og reinar endurgevingar, lætt ritstjórnað tilfar; viðmerkingar til kjak o.tíl. ikki verður roknað sum redaksjonelt innihald. Lætt ritsjórnað innihald er t.d., tá ið talan er um smávegis broytingar í brotum, sniði ella í myndastødd, keyptar teknirøðir, kjakinnlegg. Um óredaksjonelt innihald eftir einari heildarmeting fyllir ein munandi part av miðlinum, er hetta ein greið ábending um, at talan ikki er um ein tíðindamiðil, ið lýkur treytirnar fyri at fáa miðlastuðul, tí slíkt tilfar verður ikki mett at lúka treytina um redaksjonelt innihald.

Í nr. 5 er sett sum treyt, at tíðindamiðilin skal sum vinnufelag vera skrásett í Føroyum. Um talan er um eitt útlendskt móðurfelag, men dótturfelagið søkir miðlastuðul, skal dótturfelagið vera skrásett í Føroyum.

Í stk. 2 er ásett, at tíðindanetmiðil og loftborin tíðindamiðil skulu umframt tær í stk. 1, nr. 1-5 nevndu treytir hava ein javnan og dagførdan tíðindastreym. Hetta merkir, at tíðindamiðilin hevur eina javna og dagførda framleiðslu og miðlar sjálvstøðugt journalistiskt viðgjørt tilfar av breiðum samfelagsligum áhuga.

Tað verður Miðlastuðulsnevndin, sum metir um, hvørt treytin um ein "javnan og dagførdan tíðindastreym" er lokin, og við hesum er tað nevndin, ið mennir sína egnu venju á økinum. Tískil er ásetingin heldur orðað sum standardur enn rættarregla, sum hevði merkt, at ávís nøgd skuldi verið tald upp.

Til § 5
30% av árligu stuðulsjáttanini til miðlastuðul fer til at stovnseta ein nýggjan sjálvstøðugan tíðindamiðil. Endamálið er at stuðla einum nýggjum tíðindamiðli, ið hevur til endamáls at geva út sjálvstøðugt journalistiskt viðgjørt tilfar um aktuell evni, og sum ikki kann væntast at verða stovnsettur undir vanligum marknaðartreytum. Av tí, at tað er kostnaðarmikið at seta ein nýggjan tíðindamiðil á stovn, verður skotið upp, at ein tíðindamiðil fær allan íverksetarastuðulin.

Eftir at tilsøgn er latin umsøkjara, skal tíðindamiðilin hava ein ábyrgdarhavandi redaktør, hvørs setan saman við redaksjonellum starvsfólkum í minsta lagi svarar til eitt heilt lønt ársverk. Hendan treytin skal vera lokin í seinasta lagi 6 mánaðar eftir, at tilsøgn er latin. Um talan eitt nú er um ein redaktør ella í stóran mun starvsfólk á einum øðrum miðli, ið fær rakstrarstuðul, talar tað ímóti, at talan er um ein sjálvstøðugan tíðindamiðil.

Stuðulin verður latin beinanvegin, men lýkur umsøkjari ikki treytirnar fyri stuðli longur, kann stuðulin krevjast aftur, sbr. § 10, stk. 4. Eins og við rakstrarstuðlinum, kann ársverkið býtast upp millum ábyrgdarhavandi redaktør og starvsfólk í starvsbrotum. Tað avgerandi er, at talan í minsta lagi er um eitt heilt lønt redaksjonelt ársverk, og fríyrkisfólk kunnu teljast uppí talið á ársverkum, um tey fáa eina samsýning, ið svarar til tað vanliga sambært galdandi sáttmála á økinum.

Í stk. 1, nr. 2 verður víst til § 4, stk. 1, nr. 3-5, ið merkir, at tíðindamiðilin, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at tilsøgn er givin, skal miðla sjálvstøðugt journalistiskt viðgjørt tilfar. Harumframt skal tíðindamiðilin í sínum redaksjonella tilfari venda sær til ein breiðan skara av brúkarum og ikki bert til ávísar vinnubólkar ella yrkisbólkar, limir í yrkisfeløgum, politiskum flokkum, o.s.fr., og tíðindamiðilin skal hava eitt redaksjonelt innihald innan eitt breitt evnisøki, og talan skal í høvuðsheitum vera um viðgerð av aktuellum tíðindatilfari av politiskum, samfelagsligum og mentanarligum slagi, sum er lagað til fólkið í Føroyum, og sum lýsir føroysk samfelagsviðurskifti ella útlendsk viðurskifti úr einum føroyskum sjónarhorni. Tíðindamiðilin skal sum vinnufelag vera skrásettur í Føroyum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar omanfyri til nevndu ásetingar.

Í stk. 2 er ásett, at tilsøgn um íverksetarastuðul til at seta ein nýggjan sjálvstøðugan miðil á stovn kann í mesta lagi verða veitt sum ein játtan yvir trý fylgjandi fíggjarár. Hetta merkir, at um ein miðil hevur fingið tilsøgn um ávísa upphædd t.d. 500.000 kr. um árið yvir trý ár, so er henda ávísa upphæddin bundin upp í árligu játtanina til ávísan umsøkjara, uttan so at játtanin broytist. Játtanin verður útreiðsluførd í tí ári, tá ið goldið verður út. Hon verður sostatt ikki støðlað tað fyrsta árið og síðani býtt út á seinni fíggjarár.

Broytist játtanin, soleiðis at samlaða játtanin verður minni, verður tilsøgnin broytt samsvarandi, sbr. § 5, stk. 2. Fyrivarni fyri broytingum í játtanini verður tikið í tilsagnarskrivinum.

Eitt dømi:
Samlaða játtanin til miðlastuðul á fíggjarlógini er 2,9 mió. kr. 30% av játtanini verður sett av til íverksetarastuðul – tað er: kr. 870.000.

Eini miðilin fær tá tilsøgn um kr. 870.000 í ár 1, ár 2 og ár 3. Um vit ímynda okkum, at játtanin til miðlastuðul tað næsta árið árið lækkar niður í 2,7 mió. kr., verður íverksetarastuðulin 810.000 kr. (30% av játtanini) til viðkomandi tíðindamiðil. Tað sama ger seg galdandi, um miðlastuðulin hækkar. Tískil er tað av týdningi, at fyrivarni verður tikið fyri broytingum í játtanini, sum skotið er upp í § 5, stk. 2.

Tann tíðindamiðil, ið hevur fingið tilsøgn um miðlastuðul yvir fleiri fíggjarár, skal ikki søkja av nýggjum á hvørjum ári. Miðlastuðulsnevndin skal tó leypandi hava eftirlit við, um umsøkjari, ið hevur fingið tilsøgn um íverksetarastuðul, lýkur treytirnar í tilsøgnini og lógini annars í øllum tilsagnartíðarskeiðinum. Um viðurskiftini broystast, kann Miðlastuðulsnevndin gera brúk av heimildunum í § 10.

Í stk. 3 er ásett, at tað er ein treyt fyri íverksetarastuðli, at rímilig orsøk er til at halda, at tíðindamiðilin, sum verður settur á stovn, kann bera seg fíggjarliga sjálvstøðugt, tá ið tilsagnartíðarskeiðið er úti. Hetta merkir, at tað ikki eigur at verða latin stuðul, um tað er greitt ósannlíkt, at nakar miðil spyrst burtur úr verkætlanini. Ásetingin merkir tó ikki, at umsøkjari skal prógva, at tað er sera sannlíkt, at miðilin fer at bera seg fíggjarliga. Tað er nokk, at tað eru rímilig sannlíkindini fyri, at verkætlanin fer at hava við sær stovnsetan av einum tíðindamiðli við einari fíggjarliga sunnari og jaligari rakstrarætlan og virksemisætlan. Í metingini kann Miðlastuðulsnevndin taka við møguleikan hjá miðlinum seinni at fáa rakstrarstuðul. Miðlastuðulsnevndin kann leypandi krevja frágreiðingar um gongdina í verkætlanini og tryggja, at treytirnar framvegis eru loknar, so hvørt stuðulin skal rindast út.

Í stk. 4 er ásett, at miðil ella miðlasamtak ikki kann fáa annan stuðul sambært hesi lóg, so leingi viðkomandi fær íverksetarastuðul. Ikki fyrr enn tíðindamiðilin er vorðin fíggjarliga sjálvberandi og tilsagnartíðarskeiðið er runnið, og tíðindamiðilin lýkur vanligu krøvini fyri tí, kann hann fáa rakstrarstuðul. Um tíðindamiðilin í tilsagnartíðarskeiðinum verður skipaður í eitt miðlasamtak, ið fær rakstrarstuðul sambært §§ 3 og 4, telja útreiðslurnar til journalistiska framleiðslu hjá viðkomandi tíðindamiðli, ið fær íverksetarastuðul, ikki uppí útrokningargrundarlagið til rakstrarstuðulin. Hóast miðilin verður skipaður sum partur av einum samtaki, kann tað hava týdning fyri metingina av, hvørt tíðindamiðilin framvegis er at meta sum ein sjálvstøðugur tíðindamiðil, ið er ein fyritreyt fyri íverksetarastuðli, sbr. § 10, stk. 4. Tað verður upp til Miðlastuðulsnevndina at avgera eftir einari ítøkiligari meting av ítøkiligu umstøðunum.

Í stk. 5 er ásett, at tað er møguligt hjá Miðlastuðulsnevndini í undantaksføri at lata eina rest av íverksetarastuðlinum til rakstrarstuðulin, um tað eftir einari ítøkiligari meting av øllum sakligum og viðkomandi fyrilitum ikki verður mett at vera grundarlag fyri at geva meiri út til íverksetarastuðul tað ávísa tíðarskeiðið, at tilsøgnin um íverksetarastuðul stendur við. Um man ímyndar sær, at tað einans er grundarlag fyri at luta t.d. 25% út sum íverksetarastuðul, tí at tað eitt nú ikki vísir seg at vera nóg kostnaðarmikið at seta viðkomandi tíðindamiðil á stovn, ella at eginfiggingin ikki røkkur til meiri, tá verður avlopið áljóðandi 5% latið til rakstrarstuðulspartin, sum man skal søkja um á hvørjum ári. Hetta merkir sostatt, at rakstrarstuðulin gerst 75% í tilsagnartíðarskeiðinum, at viðkomandi umsøkjari hevur fingið 25% í íverksetarastuðli.

Til § 6
Umsøkjari skal saman við umsóknini skjalprógva at hava eina eginfígging, sum í mun til íverksetarastuðulin svarar til í minsta lagi 40% av metta tørvinum sambært virksemisætlan og fíggjarætlan.

Til § 7
Ásetingin er hin sama sum áður. Fyri at tryggja armslongd við tað politiska valdið í mun til fjølmiðlarnar, ásetir lógargreinin, at landsstýrisfólkið skal seta eina Miðlastuðulsnevnd, sum tekur endaliga avgerð innan fyrisitingina í miðlastuðulsmálum.

Fyrisitingarrætturin er galdandi fyri virksemið hjá nevndini, og tískil skal forfólkið hava løgfrøðiligt embætisprógv frá lærdum háskúla. Hóast avgerðirnar hjá Miðlastuðulsnevndini eru endaligar innan fyrisitingina, kunnu avgerðirnar hjá nevndini tó í síni heild leggjast fyri dómstólarnar sambært rættargangslógini fyri Føroyar, eins og til ber at klaga til Løgtingsins umboðsmann. Hóast tað er ein treyt á óskrivaðum grundarlagi sambært meginregluni um góðan fyrisitingarsið, verður treytin um at fráboða avgerðir skrivliga innlimað í lógina. Ofta hevur tað víst seg, at myndugleikar gloyma at fráboða avgerðir skrivliga. Tað er óheppið, tí greið atlit til rættartrygdina tala fyri, at tað skal vera vissa um innihaldið í einari fyrisitingarligari avgerð, og myndugleikin skal í hesum sambandi eisini grundgeva sambært fyrisitingarlógini. Á tann hátt skal Miðlastuðulsnevndin vísa fólki á, hvaðani heimildin at taka eina avgerð stavar frá, og hvørji saklig og viðkomandi fyrilit avgerðin er grundað á, tá ið nevndin tekur avgerð grundað á eina ítøkiliga heildarmeting.

Landsstýrisfólkið hevur bert møguleika at velja millum tey tilmæltu, og tað er landsstýrisfólkið, ið tekur avgerðina um at tilnevna, hóast tað hevur avmarkaðar valmøguleikar.

Orsøkin til, at skyldan at skjóta upp mann og kvinnu er ásett í lógini, er tann, at mett verður ikki, at tað er heimild hjá landsstýrisfólkinum at krevja av privatum yrkisfeløgum s.s. Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Felagnum Føroysk Miðlafólk at skjóta upp persónar av ymiskum kyni. Hetta er grundað á tann løgfrøðiliga veruleika, at tað stendur beinleiðis í viðmerkingunum til javnstøðulógina, sum í sínum upprunauppskoti hevði niðanfyri standandi orðing í § 8, stk. 2:

"Stk. 2. Um privat feløg eiga rættindi at skjóta upp lim ella limir í almennar nevndir, ráð ella líknandi, skulu hesi altíð skjóta upp bæði mann og kvinnu. Hetta er eisini galdandi fyri sjálvsognarstovnar o.l., tá ið tað almenna rindar meginpartin av rakstrinum."

Meirilutin í táverandi Rættarnevndini valdi tó seinni at strika § 8, stk. 2 í upprunauppskotinum. Sambært nevndarálitinum í løgtingsmáli 122/1993, stendur á bls. 661:

"Í uppskoti landsstýrisins er § 8, stk. 2, tikið burtur. Hetta pettið snúði seg um, hvussu privat feløg og sjálvsognarstovnar skulu velja umboð í almennar nevndir og ráð. Grundgevingin fyri at taka burtur hetta pettið er, at rættarnevndin er av teirri áskoðan, at man við hesi lóg skal avmarka uppílegging í viðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum."

Av tí at Felagið Føroysk Miðlafólk og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið eru privat yrkisfeløg, ið sambært lógini eiga rætt at skjóta upp lim í Miðlastuðulsnevndina, er teimum við ásetingini í § 7, stk. 4 álagt at skjóta upp mann og kvinnu fyri at tryggja javnstøðu í mestan mun.

Miðlastuðulsnevndin verður sett saman soleiðis, at limirnir hvør sær skulu hava førleikar, ið samanlagt geva nevndini førleika og dyggan kunnleika til og innlit í føroysk samfelagsviðurskifti, fjølmiðlar, fíggjarviðurskifti og roknskaparviðurskifti. Hetta verður gjørt til tess at tryggja, at nevndin hevur teir førleikar, ið krevjast til at viðgera umsóknir um miðlastuðul. Dyggur kunnleiki merkir í hesum høpi, at viðkomandi hevur útbúgving og/ella drúgvar starvsroyndir innan nevndu øki. Limir og tiltakslimir verða valdir fyri trý ár í senn og kunnu í mesta lagi sita í tvey skeið á rað. Tá ið limur víkir úr sæti ella ikki fær møtt, tekur tiltakslimur hansara við.

Til § 8
Fyri at lætta um umsitingina skal serligt oyðiblað nýtast. Landsstýrisfólkið kunnar almenningin um umsóknarfreistir o.a. á síni heimasíðu, sbr. eisini § 11, stk. 2, ið ásetur, at tað bert er umsøkjari sambært tilsøgn, ið hevur rætt til stuðul, og tilsøgnin kann ikki verða avhend øðrum, sett í veð o.tíl.

Til § 9
Nevndin er viðtøkufør, tá ið allir limir eru møttir á fundi, tó kann forfólkið sjálvt avgreiða ávís smærri mál so sum. áheitanir um innlit og at fylgja upp á støðlaðan stuðul frá undanfarnum árum.

Forfólkið ger fundarskrá og kallar nevndina skrivliga inn til fundar. Miðlastuðulsnevndin hevur sambært fyrisitingarrættinum skyldu til at taka avgerð á einum fult upplýstum grundarlagi (upplýsingarskyldan), og nevndin má eisini umvegis sína venju virða líkaregluna, eins og nevndin skal fyrisita formliga og sakliga rætt sambært fyrisitingarrættinum.

Við árslok á hvørjum ári gevur Miðlastuðulsnevndin landsstýrisfólkinum eina skrivliga frágreiðing um sítt virksemi. Landsstýrisfólkið leggur frágreiðingina alment fram á netið.

Í kunngerð um Miðlastuðulsnevnd eru ásettar reglur fyri uppgávur, viðgerð og starvsskipan fyri virksemið hjá Miðlastuðulsnevndini, sum framvegis verður í gildi, sbr. § 13, stk. 3.

Til § 10
Roknskaparupplýsingar skulu sum meginregla hava grannskoðaraátekning, uttan so at talan er um stuðul minni enn kr. 100.000,00, sbr. játtanarskipan landsins. Játtanarskipan landsins er galdandi fyri stuðulsumsitingina, undir hesum serliga § 21, stk. 2 og 3 í kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Rakstrarstuðulin til beinleiðis journalistiska framleiðslu verður latin fyri skjalprógvaðar rakstrarútreiðslur, sum miðilin hevur havt árið fyri stuðulsárið, sbr. í hesum sambandi viðmerkingarnar til § 3. Í sambandi við umsóknina skulu stuðulsheimiladu útreiðslurnar í roknskapinum váttast við átekning frá grannskoðara. Um treytir fyri stuðli ikki eru loknar, verður heimilað Miðlastuðulsnevndini at krevja stuðulin heilt ella lutvíst afturrindaðan. Tað kann vera, um miðilin í sambandi við umsókn sína hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella miðilin í sama sambandi hevur tagt burtur týðandi upplýsingar, ella at

fyritreytir fyri stuðlinum ikki eru til staðar longur, t.e. at miðil við tilsøgn um íverksetarastuðul av einhvørjari orsøk ikki longur er at meta sum sjálvstøðugur. Eisini kann tað vera, at miðilin ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars t.d. at miðilin er farin á húsagang. Tá kann eitt trotabúgv ikki krevja ikki-útgoldnan stuðul útgoldnan.

Til § 11
Ásetingin heimilar panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum, um tað skuldi hent, at tað almenna hevur eitt fíggjarligt krav mótvegis miðlinum, tí viðkomandi ikki heldur treytirnar fyri stuðli, brúkar stuðulin til annað endamál enn lýst í umsóknini ella onkursvegna hevur villleitt nevndina við skeivum upplýsingum.

Sum nakað nýtt er ásett í § 11, stk. 2, at tað er bert umsøkjari, ið hevur rætt til stuðul sambært hesi lóg, og stuðulin kann ikki verða avhendur øðrum, settur í veð o.tíl. Orsøkin til hetta er, at tað til tíðir hevur verið ógreitt, hvør rættindahavarin er, tá ið miðil søkir ella fer á húsagang. Sostatt er tað umsøkjarin sjálvur, ið er rættindahavarin, og tilsøgnin um stuðul kann ikki avhendast, setast í veð ella annað líknandi.

Landsstýrisfólkinum verður heimilað at áseta reglur um stuðulsfyrisiting, ið nevndar eru í § 25, stk. 1, nr. 1-8 og nr. 10 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan. Um treytir fyri stuðli ikki eru loknar, verður heimilað Miðlastuðulsnevndini at krevja stuðul heilt ella lutvíst afturrindaðan sambært § 10, stk. 4, ið eisini er revsiáløgd.

Til § 12
Talan er um eina revsiáseting, um umsøkjari eitt nú ikki upplýsir, gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella tíðindamiðil í sama sambandi hevur tagt burtur týðandi upplýsingar, ella tíðindamiðil ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars, sbr. § 10, stk. 2 og 4. Talan kann eisini vera um brot á reglur, ið landsstýrismaðurin ger við heimild í § 11, stk. 3, t.e. reglur viðvíkjandi stuðulsumsiting, sum landsstýrismaðurin kann áseta í kunngerð, sbr. § 25 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan.

Til § 13
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Um tilsagnir um eitt nú verkætlanir sambært galdandi lóggávu framvegis skuldu verið í gildi, tá ið hendan lógin kemur í gildi, eru tær fevndar av áður galdandi reglum t.e. tær reglur, ið eru galdandi í dag.

Av tí at eingin stórvegis broyting er viðvíkjandi Miðlastuðulsnevndini annað enn, at forfólkið kann avgreiða smærri mál so sum áheitanir um innlit og fylgja upp upp á støðlingar, verður kunngerð um Miðlastuðulsnevnd framvegis í gildi, til nýggj kunngerð um Miðlastuðulsnevnd verður gjørd.

Tann Miðlastuðulsnevnd, ið er tilnevnd í 2025, situr skeið sítt út sambært tilnevningarskrivinum.

Almanna- og mentamálaráðið, 25. nov. 2025

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Vinnuhúsið
Fylgiskjal 2: Miðlastuðulsnevndin
Fylgiskjal 3: Portal.fo
Fylgiskjal 4: FM1
Fylgiskjal 5: Føroya Blaðútgevarafelag
Fylgiskjal 6: Rás 2
Fylgiskjal 7: JN.fo
Fylgiskjal 8: Føroysk Miðlafólk
Fylgiskjal 9: Frihedsbrevet
Fylgiskal 10: VP.fo
Fylgiskjal 11: TAKS
Fylgiskjal 12: Eysturoyarportalurin
Fylgiskjal 13: Frágreiðing frá Nordicom